# Samkynd í Norðurlandahúsinum

MANIJEH MODI



Viðvíkjandi lýsing í Útvarpinum ígjár kl. 18, um ráðstevna í Norðurlandahúsinum fyri tey samkyndu

Eg vil gera vart við, at ANSO ikki skipaði fyri seinasta ráðstevna/ skrúgonga fyri samkynd í Føroyum fyri 2 árum síðani, sum tað bleiv sagt í útvarpinum herfyri.

Tá var tað tað føroyska felagið Bogin (sum Friðarbogin men fyri lesandi og ung), sum endaði við at standa fyri tiltakinum. Bogin stóð fyri allari praktiskari fyrireiking heima í Føroyum, alla projektleiðsluárbyrgd sovæl sum alla fíggjarligu ábyrgdina fyri veitarum, lutakarum teimum grunnunum, sum veittu pening til tiltakið. Allir teir føroyingar, sum vóru við til at skipa fyri, sum á ymiskan hátt hjálptu og stuðlaðu, vóru sostatt við til at hýsa ANSO her heima hjá okkum í Føroyum, og taka undir við bæði ráðstevnu sovæl sum skrúðgonguni.

Sjálvt um vit gleðast yvir og heilsa øllum tiltøkum til frama fyri samkynd í Føroyum vælkomnan, hevði tað kanska verði uppaftur betur, um limirnir í felagnum fyri tey samkyndu høvdu verði betri kunnaði um tiltakið framanundan, soleiðis at luttøka kundi tilrættaleggjast. Sama kann sigast um føroyingar kundu verði við til at fyrireika tiltakið, soleiðis at tað kennist sum okkara/eitt tiltak við gróðrarbotn í føroysku rørsluna fyri tey samkyndu.

Sum nú er kennist tað ikki sørt fremmand, at vera kunnað 2 dagar áðrenn gjørnum útvarpið, uttan hóming um hvat og hvar tiltakið skal vera. Onkur hevur bjóða sær til at hjálpa, um nakað bleiv, uttan at fáa orð aftur tey seinastu 2 mánaðirnar.

Eingin av teimum 6 limunum av Friðarbogan eg tosaði ígjar visti hvar ráðstevnan skuldi vera, og flestu (tað vil siga 5) vistu ikki, at nakað skuldi vera yvirhøvur her í vikuskiftinum. Helvtin søgdu seg tíanverri vera stødd uttanlands, vegna væntandi kunning.

Ynski er tí um betri kunning, serliga tá feløg við útlendingum á odda skipa fyri tiltøkum í Føroyum. Hetta til tess at gera tiltøknini so væleydnað sum gjørligt - eisini (serliga?) fyri okkum sum búgva her heima á klettarnar.

# Avleiðingar av at gera Føroyar til eitt valdømi

ZAKARIAS WANG



Nú verður nógv talað um at gera Føroyar til eitt valdømi.

Mong eru tey, sum halda seg vita, hvat ið tað fer at bera við sær.

Tað geri eg ikki.

Sannleikin er tann, at eingin dugir at síggja frammanundan, hvat ið broytingar av vallógini kunnu føra við sær. Man nakar halda, at Atli Dam, tá hann gjørdi vallógarbroytingina í 1978, kundi ímynda sær, at henda broyting kom at gera, at Tjóðveldisflokkurin í 2004 skuldi gerast størsti flokkur á løgtingi, hóast tveir aðrir flokkar fingu størri undirtøku millum veljararnar?

Núverandi løgting kann nú samtykkja eina vallóg, sum ger tað møguligt hjá tí minniluta, sum býr í Tórshavn, at fáa meirilutan á løgtingi. Vit vita ikki, um tað hendir, men tað kann henda, so sum gongdin í Grønlandi tykist at benda á.

Munu tey vera mong, sum halda hetta vera eitt demokratiskt framstig?

# Lovændring med “Søg og Erstat”

Det
MICHAEL H. FELD-BALLE HANSEN
Michael@feldballe.net



lovforslag lagtingets formand Edmund Joensen har lagt frem bærer præg af juridisk hastearbejde og minder meget om en indholdsændring ved brug af Søg- og Erstat-funktionen i et tekstbehandlingsprogram. Således må han i al hast have udarbejdet en lovændring, der desværre ikke tager højde for to væsentlig aspekter: Udregningsmetode og spærregrænse; som flere herunder Aanung Hylland (1990) og Peter Zachariassen (2005) har berørt i deres kritik af det færøske valgsystem.

Og det er meget enkelt. Den udregningsmetode der får lov at overleve i § 31 i valgloven omhandler brugen af d’Hondt metoden, der er anerkendt som værende udemokratisk i forhold til stemmefordelingen mellem store og små partier. Skulle man revurdere valgloven, bør man som det mindste få ændret ved denne fordelingsmetode.

Tilsvarende har man haft et hensyn til en spærregrænse i den færøske valglov, men kun ved tildeling af tillægsmandater. Det nuværende lovforslag indeholder slet ikke dette hensyn.

På grund af manglende villighed til debat af det færøske valgsystem har dette lovforslaget fået lov til at komme i Lagtinget. Må det til den debat der forhåbentlig nu vil rejse sig om dette emne være at anbefale følgende: Brug St. Lagüe udregningsmetoden og indfør en spærregrænse å mindst 1/31 –del af stemmer, helst en fast procentsats. Med seneste valgresultat fra 2004 som eksempel vil det give følgende resultater:

Edmund Joensens forslag:

| Parti | A | B | C | D | E | H | K |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mandater | 7 | 8 | 7 | 1 | 7 | 1 | 0 |

Et mere demokratisk forslag hvis vi skal have 1 valgkreds:

| Parti | A | B | C | D | E | H | K |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mandater | 6 | 7 | 7 | 1 | 7 | 2 | 0 |

Mon ikke lagtingets formand har kigget på denne fordeling før han satte sig ved computeren og foretog nogle små ændringer i den eksisterende valglov?

# Føroya Stuttligasti Politikkari

SKEMT
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið 1. sept. kl. 19.30 á Giljanesi.

Borðreitt verður við breyði, skerpikjøti, rullupylsu o.ø. góðum viðskera og einumhvørjum leskiligum at drekka.

Meðan borhaldið er, fara seks politikarar, sum vit vanliga bert hoyra tosa um álvarslig samfelagsmál, privatiseringar o. a. at royna síni skemtiligu evni.

Ein dómsnevnd, mannað við kommunalpolitikkarum úr Vágum, skal velja ” Føroya stuttligasta politikkara”.

Teir, ið fara at dystast um hetta heitið, verða : Jørgin Niclasen, Asbjørn Djurhuus, Vilhelm Johannesen, Kári P Højgaard, Tórbjørn Jacobsen og Bill Justinussen.

Frásøgumaður verður Robert Mc.Birnie, sum hevur hótt við at koma við skemtiligum viðmerkingum til hesar seks.

Felagssangurin verður skipaður av Hans Hjalta Skaale, sum eisini fer at framføra onkra av sínum kendu vísum.

Um miðnáttarleitið byrjar dansurin. Fyrst spæla Thunderbirds úr Vestmanna og umleið kl. 01 spælir íslendski bólkurin SúEllen.

Tiltakið endar kl. 03.30.



*»Føroya stuttligasti politikari« verður valdur á tiltaki á Giljanesi 1. sept.*

# Dimmalætting kærd til Fjølmiðlanevndina

RÆTTLEIÐING
*Summar Festivalurin*

Dimmalætting ger í mánadagsblaðnum nógv burtur úr, at trygdin á Summar Festivalinum sambært tveimum starvsfólkum á festivalinum ikki var í lagi.

Summar Festivalurin hevur arbeitt tætt saman við myndugleikunum um trygdina á festivalinum. Hetta er gjørt bæði áðrenn festivalin, undir festivalinum og eftir festivalin, og samstarvið hevur verið stak gott. Myndugleikarnir hava góðkent almennu trygdina á Summar Festivalinum bæði undan festivalinum og í eftirmetingini.

Ein av sentralu pástandunum í greinini í Dimmalætting er, at tað vóru 28 eftirlitsfólk til 10.000 fólk. Hetta er ein sera misvísandi pástandur. Kontrollarnir, ið halda vakt við inngongdina og økinum, eru bert ein partur av vaktarhaldinum og trygdarskipanini hjá Summar Festivalinum. Umframt hesar kontrollar, var eitt størri lið av løgreglumonnum, fólk frá Reyða Krossi Føroya, Klaksvíkar Sløkkiliði, Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Norðoya Bjargingarfelag virkin á festivalinum, og tí er talið á teimum, ið høvdu við eftirlit og trygd á Summar Festivalinum at gera, omanfyri 100.

Fyri at minka um trýstið við stóra pallin, hevði Summarfestivalurin ein stórskíggja, sum var við til at spjaða stóru mannamúgvuna. At tað gjørdist tætt og trongligt í tjaldinum hóskvøldið, mugu vit taka til eftirtektar.

Summar Festivalurin harmast, at Dimmalætting, sum ein av landsins størstu tíðindamiðlum, setir til síðis góðan fjølmiðlasið og ikki letur Summar Festivalin koma til orðanna í greinini og svara skuldsetingunum. Hetta gevur greinini stóra slagsíðu og forðar fyri at týðandi misskiljingar, sum eru grundarlag undir greinini, verða svaraðar.

Greinin er í stríð við góðan fjølmiðlasið, og tí fer Summar Festivalurin at kæra greinina í Dimmalætting til Fjølmiðlanevndina.